listastevna føroya 2001

# Spæla nýuppfunna tónleikaslagið Norkney

**Rithøvundurin og tónleikarin Duncan McLean vitjar Listastevnuna sum upplesari og tónleikari. At eyðmerkja tónleikin er trupult, men eftir kjak og vendingar verður komið fram til nýggja orðið norkney**

listastevna føroya 2001

*Dagfinn Olsen*

Duncan Mclean byrjaði sum stand-up undirhaldari og tónleikari. Síðani fór hann at skriva bøkur og er í dag millum kendastu ungu skotsku rithøvundar. Hann hevur fingið fleri viðurkenningar.

Hann hevur skrivað bøkur við støði í ferðaupplivingum, og hann hevur skrivaå til sjónvarp. Han skrivar eisini sjónleikir, m.a. hevur hann skrivað um ein oljuplattform. Eisini kemur hann inn á tónleik, serliga swing, ið honum dámar væl.

Duncan vitjar sum høvundur og tónleikari við bólkinum Chilli Strong Pepper, ið spælir á Cafe Natúr um vikuskiftið.



## Norkney sær dagsins ljós

Tá umrøðast skal, hvussu tónleikaslagið skal nevnast, kemur kjak burturúr. Talan er um eina samanrenning av traditiónsbundnum tónleiki og tí, ið nevnt verður texas. Uppskotini eru mong um okkurt serstakt heiti fyri tónleikin, t.d. Orkney Swing, Northern Swing. Men á ferðini til Føroya eydnaðist so at finna eitt heiti á tíðindafundinum í Norðurlandahúsinum í gjár. Chilli Strong Pepper spælir altso NORKNEY, kunnu vit avdúka.

## Good time music

Duncan sigur tað vera áhugavert at vitja í Føroyum. Partvis sum íblástur, men eisini, tí hann áður hevur fingið íblástur frá tónleiki eftir Kristian Blak. Hann kennir William Heinesen og aðrar norðurlendskar høvundar.

Hoyra vit um tónleik frá skotlandi og har á leið, so rennur hugurin ofta til ølstovur og glað fólk í tubbaksmjørka.

Chilli Strong Pepper siga seg eisini spæla tað, tey nevna good time music. Tónleik til eitt vikuskiftiskvøld við gaman.

- Okkum dámar best at spæla óformel støð, so fólk kunnu fáa eina øl, flenna, ...berjast og bróta gløs..., nei, vit skemta, flenna limirnir í Strong Pepper.

Duncan fegnast um ferðina til Føroya, tí annars hevur hann bert vitjað her í huganum.

# Ballett í Føroyum



**Tað er ikki ofta, at føroyingar sleppa at uppliva ballett, men nú vitjar Pars Pro Toto**

listastevna føroya 2001

*Dagfinn Olsen*

Lára Stefansdóttir er limur í Dance Company Íslands. Umframt hevur hon Pars Pro Toto, har hon m.a. dansar eftir tónleiki hjá manni sínum, Guðni Franzon, ið eisini leikar í bólkinum Caput.

Lára hevur áður vitjað í Føroyum og hevur tá dansað eftir tónleiki hjá Kristian Blak.

Hon hevur júst vunnið virðisløn í Helsinki fyri koreografi.

Hon sigur, at tvey verk eru á skránni á Listastevnuni og at tey annars eru sera umhugsin um íslendskt í arbeiðinum. Fyrra verkið byggir á íslendska søgu. Tað er Langbrók, ið er kvinna úr Njáls søgu. Hetta er drama.

Hitt verkið er meira til undirhalds og eitur Lady fish & chips.

Eisini Lára hevur ferðast víða og ført fram.





# Uppskot um búskapargrunn í óvissu

**Á fundi í Fíggjarmálastýrinum hósmorgunin varð eitt fyribils uppskot til løgtingslóg um Búskapargrunn Føroya lagt fram fyri tinglimum úr øllum flokkum. Men longu nú er óvist um aðrir flokkar enn Tjóðveldisflokkurin taka undir við uppskotinum**

*Rúnar Reistrup*



Eftir at politikarar hava kjakast alment í fjølmiðlunum um ætlaða búskapargrunnin í góða viku, valdi Fíggjarmálastýrið at leggja eitt fyribils uppskot um Búskapargrunn Føroya fram fyri tingmenn og fjølmiðlar hósdagin.

Í fyribilsuppskotinum til løgtingslóg um Búskapargrunn Føroya stendur greitt, at grunnurin skal brúkast til skiftisgrunn í árunum 2002 til 2016. Lagt verður upp til, at frá komandi ári av, skal ríkisveitingin úr Danmark ikki longur fara inn á fíggjarlógina, men hinvegin verða beind í búskapargrunnin.

Haðani skal skiftisgjald so flytast yvir á fíggjarlógina. Fyrsta árið skal skiftisgjaldið, sambært fyribils lógaruppskotinum, vera 700 milliónir. Hendan upphædd skal so minka við 50 milliónum hvørt ár til hon í 2016 fellur heilt burtur.

## Samgongan ikki samd

Júst hvør í veruleikanum stendur aftan fyri fyribilsuppskotið um Búskapargrunn Føroya, er eitt sindur ógreitt. Eingin tykist at vita við vissu, um hetta er eitt uppskot hjá samgonguni, sum nú verður lagt út til andstøðuna at koma við viðmerkingum til, ella um fyribils uppskotið bert hevur ein part av samgonguni aftan fyri seg.

Sambært Høgna Hoydal, landsstýrismanni við sjálvstýrismálum, so byggir fyribils uppskotið á ta semju, sum var millum samgonguflokkarnar, men sum landsstýrismaðurin sjálvur sigur, so er tað ikki til at vita, hvør er samdur í hvørjum, tí samgongupolitikarar tykjast at skifta meining nokkso ofta í hesum tíðum.

## Løgmaður vil hava greiðari reglur

Løgmaður gav í síðstu viku nøkur signal um, at hann ikki var heilt samdur við Tjóðveldisflokkinum um, hvussu ætlaði búskapargrunnurin skuldi síggja út. Millum annað loyvdi hann sær at ivast í, um tað var rætt at gera búskapargrunnin, ið upprunaliga fyrst og fremst varð ætlaður oljuinntøkum, til eisini at vera skiftisgrunn at fíggja loysingina við.

Løgmaður hevur eisini sagt seg vera av teirri fatan, at eitt lógaruppskot um Búskapargrunn Føroya eigur at innihalda ásetingar um, hvussu útgjaldið úr grunninum skal fara fram. Landsstýrismaðurin við sjálvstýrismálum sigur hinvegin, at tað hevur ongan skund at áseta útgjaldingarreglur, men at tað heldur ræður um at fáa ein búskapargrunn settan á stovn skjótast gjørligt.

Fyribils uppskotið um búskapargrunnin ásetur ongar reglur um útgjald úr grunninum.

## Sinnaðir at slaka

Á tíðindafundi í Fíggjarmálastýrinum hósdagin søgdu bæði fíggjarmálaráðharrin, Karsten Hansen, og landsstýrismaðurin við sjálvstýrismálum, Høgni Hoydal, at teir vildu virka fyri at fáa eina breiða semju í lag í tinginum fyri búskapargrunninum. Og spurdir um tað kundi hugsast, at ætlaði skiftisgrunnurin varð skildur úr búskapargrunninum og ístaðin stovnaður sum ein grunnur fyri seg, um hetta kravdist fyri at finna eina breiða semju, varð ongin hurð latin aftur.

– Tað kann møguliga hugsast, segði Høgni Hoydal, landsstýrismaður við sjálvstýrismálum.


**Montørur og telebúðarfólk til Føroya Tele í Runavík**

"Vel sjálv/-ur ta broyting, tú ynskir í verðini."
Mahatma Ghandi

Vegna vaksandi virksemi, flytir deildin hjá Føroya Tele í Søldarfirði til Runavíkar, tíðliga í heyst. Í hesum sambandi søkja vit eftir 2 fólkum til Føroya Tele í Runavík at byrja 1. september 2001 ella skjótast tilber.

**TELEBÚÐARFÓLK**
Telebúðin í Runavík er ein av sjey Telebúðum kring landið. Telebúðirnar hava ment seg munandi seinastu árini og ætlanirnar fyri framtíðina eru stórar.

Til Telebúðina í Runavík er tørvur á einum handilsfólki, sum skal luttaka í øllum uppgávum, ið skulu til, fyri at viðskiftafólk okkara fáa eina fyrsta floks tænastu. Vit kunnu bjóða eitt avbjóðandi og spennandi starv í stórari menning. Eisini er møguleiki fyri at vera við í menningini av Telebúðunum sum heild.

Fyrimunur er, um umsøkjarin hevur handilsútbúgving og stóran áhuga innan økið. Ætlanin er í framtíðini at hava handilslærlingar í Telebúðini í Runavík, sum umsøkjarin helst kemur at hava ein aktivan leiklut í.

**Førleikar hjá umsøkjarunum:**
- royndir at avgreiða viðskiftafólk
- royndir við fjarskiftisútgerð og/ella aðrari tøkni
- áhuga og førleika innan tøkni
- evni at arbeiða og avgreiða mál í einum, til tíðir, stressandi arbeiðsdegi
- førleika innan allan vanligan handilsskap, t.d. kassauppgerðir og vøruteljingar

Telebúðin í Runavík fer at hava opið allar vanligar handilstíðir, og arbeitt verður í skiftum við hini starvsfólkini í Telebúðini.

**MONTØRUR**
Til Føroya Tele í Runavík er tørvur á einum montøri, sum hevur hug at geva viðskiftafólkum okkara eina fyrsta floks tænastu, og sum hevur hug at luttaka í tí stóru menningini, sum fer fram innan fjarskifti. Tann, ið settur verður, kemur í stóran mun at taka sær av nýgerð og viðlíkahaldi av telefoninnstallatiónum.

Fyrimunur er, um umsøkjarin hevur útbúgving sum elektronikmekanikari, elektrikari e.l. ella hevur hollar viðkomandi royndir.

**Vit kunnu bjóða eitt áhugavert arbeiðið við serligum atliti til**
- nýgerð og viðlíkahald av innstallatiónum
- vanliga telefonútgerð
- vekslarar
- innanhýsis kaðalskipanir
- uttanhýsis kaðalskipanir
- telefonterminalar
- internet, ISDN og snarnet
- ráðgeva viðskiftafólki um felagaútgerð og tænastur hjá Føroya Tele

**Til bæði størvini**
Starvsfólk hjá Føroya Tele skulu duga væl at avgreiða viðskiftafólk, verða opin og duga væl at samstarva. Somuleiðis vænta vit, at starvsfólkini duga enskt og hava góðan kunnleika til edv.

Størvini verða lønt sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Starvsmannafelagið fyri økið hjá Føroya Tele.

Gjøllari upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Sofus Nielsen, leiðara á Føroya Tele í Søldarfirði á telefon 441000 ella mail sn@ft.fo.

Umsóknirnar skulu verða Føroya Tele í hendi í seinasta lagi mánadagin 13. august 2001 og skulu sendast til:

**Føroya Tele**
Att.: Starvsfólkadeildin
Postrúm 27
110 Tórshavn



Føroya Tele hevur, sum ein týðandi partur í føroyska samfelagnum, ábyrgdina av meginpartinum av fjarskiftisflutninginum í Føroyum. Menningin innan fjarskiftisøkið gongur sera skjótt og hetta setur stór krav til fyritøku og starvsfólk. Vit søkja tí eftir skikkaðum fólki, sum vilja verða við til at gera tað stuttligt at venda sær til Føroya Tele.

FØROYA TELE
Skapið framtíðina saman við okkum!